# So hendi tað aftur

GUNVÁ VIÐ KELDU
Borgarstjóri



**Klaksvíkar Kommuna fer ikki at standa á síðulinjuni og bert góðtaka tær áhaldandi miðsavningarætlanir, ið vit eru vitni til í hesum døgum**

Ikki hevði eg meir enn lagt pennin í málinum um Akstovuna, fyrrenn eg lesi í miðlunum, at nú eru ætlanir um at miðsavna føroysku løgregluna í Tórshavn.

Miðsavningin skuldi eftir øllum at døma gerast skjótt og friðarliga, men eg ætli mær ikki, at henda dulda tilgongd skal sleppa at ganga friðarliga fyri seg.

Ein tann mest týðandi uppgávan hjá okkum politikarum er at skapa tryggleika fyri borgaran, og løgreglan er eitt ógvuliga sentralt amboð hesum viðvíkjandi.

**Tey fólkavaldu hildin uttanfyri**

Tað er ikki bert Klaksvíkar Kommuna sum undrast á mannagongdina hjá fútanum. Eitt nú Høgni Hoydal, hevur ein sera viðkomandi spurning til landsstýriskvinnuna í Innlendismálum, um *landsstýriskvinnan og hennara fyristing hava góðtikið, at djúptøknar bygnaðarbroytingar verða framdar í løgregluni og ákæruvaldinum í Føroyum, uttan at løgting, landsstýri, kommunur ella aðrir fólkavaldir myndugleikar eru við í arbeiðinum*?

Sambært upplýsingum í málinum er tað fútin, ið hevur ábyrgdina av hesi ætlan.

Eg vil harðliga átala hesa mannagongd. Klaksvíkar Kommuna er als ikki hoyrd í hesum álvarsmáli.

Tí er tað sera ørkymlandi at frætta, at embætisfólk fremja leikirnar í hesum talvi, meðan vit fólkavaldu verða sett á síðulinjuna.

**Løgreglustøðir stóran týdning fyri tryggleikan**

Klaksvík hevur við tíðini ment seg at verða næststørsti býur í Føroyum, og bert tankin um, at eingin løgreglustøð skal verða á næststørsta plássi í Føroyum, kann als ikki góðtakast.

Tað er millum annað við einari vælvirkandi løgreglustøð, undir leiðslu av sýslumanninum, at Klaksvíkar Kommuna hevur ment seg til tað, hon er í dag.

Løgreglan er ein veitari av trygd, og bæði borgarar og vinnufyritøkur hava tørv á hesari trygd fyri at kunna liva og virka á best møguliga hátt.

Samfelagið mennist alsamt, og vit hava vunnið størri frælsi, framgongd og fólkavøkstur. Tíverri eru eisini vandar í hvørjari vælferð, har truplir borgarar, ið ikki virða landsins lógir, seta krøv til skipanir, ið kunnu basa trupulleikunum og verja fólkið.

Núverandi vaktarskipan, sum verður samskipað frá løgreglustøðini í Tórshavn, hevði við sær, at fyri kortum tók tað ein heilan tíma hjá løgregluni at koma vegin fram til eitt álvarsamt ferðsluóhapp á Viðareiðisvegnum. Hetta er ikki gott nokk. Tí er óhugsandi at tær bygnaðarbroytingar, sum nú eru frammi kunnu koma uppá tal. Hetta má harðliga átalast.

Eg eri sannførd um, at vælvirkandi løgreglustøðir eru neyðugar á stóru økjunum í Føroyum.

Eg vil heita á Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, og landspolitikkarar, sum hava ábyrgdina og møguleikan at forða hesum ágangi, um at fáa greiðu á nevndu viðurskiftum.

Skriv um hesi viðurskifti eru í dag sent fútanum og landsstýriskvinnuni í innlendismálum.

# Høgni rokast í ringhorninum

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Vanlagnur, rættarloysi og fløkjur vóru latin mær frá undanmanninum, Høgna Hoydal**

Fari ikki at endurtaka tað eg skrivaði í míni fyrru grein, eftir óndsinnaða álopið og skeivu upplýsingarnar frá Høgna Hoydal viðvíkjandi útlendingamálum.

Tá Høgni sigur í aftursvarinum: "Sjálvur kýtti eg meg fyri at vera so dipolmatiskur sum gjørligt í míni orðing.....". Kundi ikki hugsa mær at ákært Høgna fyri ikki at vera diplomat, men bara unfair. Tað ber væl til at vera diplomat, sjálvt um ein er unfair.

At hann er á tunnum ísi, sæst í aftursvarinum. Tá hann m.a. sigur, at "málið við teilendingunum var greitt". So er hetta beinleiðis ósatt, her stóðust stórir trupulleikar.

**Rangsnúni**

Víðari sigur hann: "Jógvan man eisini minnast skeivt, tá hann heldur uppá at Fútin skal hava verið í sambandi við hann um umitingina av útlendingamálum, og at hann skal hava sett á stovn eina serliga skrivstovu...."

Eg minnist ikki skeivt. Føroya fólk minnist heldur ikki skeivt m.a. viðvíkjandi ólukkuligu yvirleveringini av sokallaða "tailendaramálinum" o.m.ø, og at fútin segði, at um vit ikki fingu skil á hesum óskili, so slepti hann heilt einfalt málunum.

Tað eg segði, og eg endurtaki: "Eitt tað fyrsta eg var noyddur at gera, var at umskipa eitt skrivstovuhøli í Innlendismálaráðnum – har frammanundan ikki var nógv pláss – til eina mestlíknandi "kriminalstovu", har eg mátti seta starvsfólk til at greiða skeivt avgreidd útlendingamál, fløkjur og vanlagnur, sum arvaðar vóru frá undanmanni mínum", sum var Høgni Hoydal. Hetta var ótespuligt arbeiði.

**Høgni og løgmaður**

Tað var heldur ikki einans táverandi løgmaður, sum Høgni sigur, sum álegði mær, at eg skuldi "umsita hesi mál á ein hátt, har munur skuldi gerast á fólki...."

Nú veit eg, at løgmaður og Høgni hava havt ókurt at greiða sína millum, men honum nýtist ikki bara at leggja skuldina á løgmann.

Sjálvur vísti eg á í greinini, at: "Tá "lítla samgonga" legði á meg at viðgera mál ólógliga, fyri at "fáa frið", noktaði eg". Soleiðs rangsnýr Høgni smart skrivaða orðið.

Við afturasvarinum minnir Høgni meg nú mest um undanleypandi boksara, sum hevur rent seg fastan í ringhorninum og roynir bara at glíða av.

Við yvirtøkuni og arvinum frá undanmanni mínum, Høgna Hoydal, í landsstýrinum, fylgdu vanlagnur, skeivt avgreidd arbeiðs- og uppihaldsloyvi og rættarmál.


Sosialurin
...altíð við tí nýggjasta




Tekna teg sum haldara nú

kr. 495,-
um ársfjórðingin
Spar 560,- í mun til leysasølu

Send lepan til:
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn

Ja takk! Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óporstað. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:




NÝGGJA LILJAN

NÝGGJ starvsfólk eru komin í Liljuna og vit hava fyri stuttum verið á skeið hjá MATRIX, ið er merkið, sum Liljan umboðar.

Vit í Liljuni kunnu bjóða tykkum nógv spennandi, sum t.d. HÁRFRÍÐKAN, HÁRSETAN, PIERCING, TATTOOVERING, SOLARIUM og MASSAGU VASK.

Vit hava eisini fingið restgoymsluna frá Flykrini í Miðlon, har vit selja undirklæðir fyri HÁLVAN PRÍS og hvørt plaggið fyri BARA 100 kr.

Vælkomin í Liljuna í Torfinsgøtu

MATRIX
SALONG LILJAN
Torfinsgøta 6 100 Tórshavn Tel. 314768